# Heilsufrøðiliga starvsstovan

# Kunning um kanningarstovurnar

**Handilstreytir**

**Dagfest: 29. januar 2003**
**Mál nr.: 50-200300087-1**

# 1 Alment

Kanningarstovurnar á Heilsufrøðiligu starvsstovuni bjóða fram sínar tænastur til einstaklingar, virki og almennar stovnar, herundir eisini innanhýsis á HS.

Tær tríggjar kanningarstovurnar á Heilsufrøðiligu starvsstovuni; kemiska-, mikrobiologiska- og fiskasjúkukanningarstovan, gera vanliga kanningar eftir nýggjastu kanningarháttum. Á økjum, har norðurlendskar ella altjóða greiningarforskriftir eru galdandi, verða hesar vanliga brúktar. Kemiska og mikrobiologiska kanningarstovan eru altjóða góðkendar (akkrediteraðar) eftir standardinum ISO/IEC 17025 og eru undir eftirliti av Dansk Akkreditering DANAK. Akkrediteringsnummarið er 303 (sí www.danak.dk). Kanningarstovurnar eru akkrediteraðar til ávísar greiningar av drekkivatni, spillvatni, matvørum og fóðri.

Niðanfyri nevndu handilsligu treytir eru galdandi, um ikki annar skrivligur sáttmáli er avtalaður millum kundan og kanningarstovurnar hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

# 2 Góðskuskipan

Kanningarstovurnar leggja stóran dent á trygd og trúvirði í kanningararbeiðinum og hava tí eina góðskustýringarskipan.
Henda tryggjar m.a. at:

- Starvsfólkini hava neyðuga útbúgving.
- Fyrimyndarligar greiningarforskriftir verða brúktar.
- Skjalprógvað og innanhýsis eftirlitssýni verða brúkt.
- Øll úrslit íroknað rádata verða eftirkannað, áðrenn tey verða latin kundanum.
- Úrslitini eru álítandi og á høgum, fakligum støði.

Haraftrat luttaka kanningarstovurnar í samanberandi kanningum við aðrar kanningarstovur uttanlands. Svarseðlar við altjóða góðkendum kanningarúrslitum eru merktar við eini kongakrúnu við skrásetingarnummarinum 303. Um kundin hevur áhuga fyri at fáa nærri upplýsingar um góðskuarbeiðið á kanningarstovunum, senda vit fegin góðskuhandbókina.

# 3 Tagnarskylda

Øll starvsfólk á Heilsufrøðiligu starvsstovuni hava, tá ið tey eru sett, skrivað undir tagnarskyldu sambært almennu revsilógini.
Dagliga merkir hetta, at starvsfólk mugu ikki uttan fyri stovnin siga frá ella tosa um úrslit ella mál, sum tey gjøgnum teirra arbeiði hava fingið beinleiðis ella óbeinleiðis kunnleika til.
Ikki má sigast frá úrslitum ella avgerðum til onnur enn tey, sum eftir avtalu eru tengd at málinum.
Tagnarskyldan er eisini galdandi aftaná, at starvsfólk eru loyst úr starvi.

# 4 Vildarloysi

Heilsufrøðiliga starvsstovan tryggjar sítt vildarloysi við, at ongin av starvsfólkunum á stovninum hevur beinleiðis fíggjarligan áhuga á tí øki, sum tey starvast.

# 5 Kundasáttmáli

Kundasáttmáli kann gerast millum kanningarstovurnar og kundan. Endamálið við einum skrivligum sáttmála er at lýsa krøv og ynskir viðvíkjandi umbidnu kanningunum, fyri á tann hátt at tryggja, at kundin og kanningarstovan hava skilt tørvin hjá hvørjum øðrum, og at kanningarstovurnar á henda hátt kunnu veita kundanum eina betri tænastu.
Skrivligur sáttmáli verður gjørdur, tá ið:

- kundin ynskir regluligar kanningar yvir longri tíð
- talan er um kanningar, sum ikki eru rutinukanningar.
- talan er um torgreiddar uppgávur, t.d. ávís krøv um greiningarhættir, fyrireikingar til kanningar, serlig kanningarútgerð ella serligar svarseðlar.

# 6 Sýnistøka

Tøka av sýnum kann avtalast við deildarleiðaran ella yvirlaborantin fyri ávikavist kemisku, mikrobiologisku og fiskasjúku kanningarstovuna. Kanningarstovan vil fegin hjálpa til við sýnistøku, um kundin hevur áhuga fyri hesum. Til serliga sýnistøku, t.d. av drekkivatni, skal brúkast serlig sýnistøkuíløt. Haraftrat er vegleiðing til, hvussu sýnistøkan skal fara fram.

# 7 Sýnisnøgd

Nøgd av sýni, sum skal brúkast til kanningarnar, verður vanliga avtalað við kanningarstovuna, áðrenn sýnið verður sent kanningarstovuni.

# 8 Innlating av sýnum

Áðrenn sýnini verður sent á kanningarstovurnar, skal avtala gerast við starvsfólk á kanningarstovunum um, nær sýnini verða send, hvussu nógv sýni, hvørjar kanningar skulu gerast osfr.
Sýni, sum skulu kannast sama dag, sum tey eru tikin, skulu - um ikki annað er avtalað - verða kanningarstovuni í hendi innan kl 12.00.

## 9 Sýnisseðil

Við sýnunum skal altíð fylgja ein sýnisseðil, sum í minsta lagi skal innihalda hesar upplýsingar:

- Navn, búðstað og telefon nr. hjá kundanum
- Sýnisslag
- Merking av sýnunum, nær sýnini eru tikin, um hetta hevur týdning
- Hvørjar greiningar skulu gerast
- Undirskrift kundans

Ávís sýnissløg krevja, at standard sýnisseðil verður brúktur. Sýnisseðlar fyri tey ymisku sýnissløgini finnast á www.hfs.fo.

## 10 Kvittan fyri móttøku

Tá ið vit hava móttikið sýnini saman við sýnisseðlinum, verður seðilin faksaður aftur við dato og undirskrift og møguliga tí málnummari, sýnið hevur fingið. Hetta er ein váttan fyri, at vit hava móttikið sýnið, og at tær umbidnu kanningarnar verða gjørdar. Sýnini verða, so skjótt sum møguligt, skrásett í telduskipanini hjá kanningarstovunum. Kanningarstovurnar hava ábyrgd av at goyma sýnini á rættan hátt, inntil kanningarnar verða gjørdar.

## 11 Kanningartíð

Sýnini verða vanliga kannað í tí raðfylgju, sum tey koma á kanningarstovurnar. Úrslitini verða send til kundan, tá ið kanningin er liðug. Úrslitini fyriliggja vanliga innan 10 arbeiðsdagar aftaná, at sýnið er latið inn. Ávísar kanningar kunnu tó taka longri tíð.
Um kanningartíðin av eini ella aðrari orsøk verður longri enn avtalað, fær kundin boð um hetta sum skjótast.
Tá ið størri uppgávur, seruppgávur ella afturvendandi uppgávur skulu gerast, kann kanningartíðin avtalast, áðrenn uppgávan byrjar.

## 12 Goymsla av sýnum

Tey kannaðu sýnini verða goymd í minsta lagi 14 dagar aftaná, at sýnið er kannað, tó alt eftir hvat fyri slag av sýnum, talan er um. Um kundin ynskir at fáa restina av sýninum aftur, eftir at kanningin er liðug, skal viðmerking skrivast um hetta á sýnisseðilin.

## 13 Svarseðil

Úrslitini verða send skrivliga. Fyribils úrslit kunnu í einstøkum førum fáast munnliga ella við faksi. Tá ið kanningarúrslit eru hægri enn markvirði ásett í kunngerð ella almennum rundskrivi, skal deildarleiðarin fyri kanningarstovuna gera kundan vart við hetta sum skjótast.
Skulu úrslitini sendast við faksi verður eitt ávíst gjald tikið fyri hetta.

Svarseðilin inniheldur í minsta lagi:

- Um úrslitini eru frá kemisku, mikrobiologisku ella fiskasjúkudeildini
- Navn og búðstað kundans
- Sýnisslag og merking av sýninum
- Móttøkudag
- Úrslit
- Ávísing til greiningarhátt, møguliga altjóða standard
- Parametur
- Undirskrift hjá einum, sum hevur heimild at skriva undir.

## 14 Frágreiðing um úrslitini

Um kundin ynskir eina tulking av úrslitunum, er kundin altíð vælkomin at skriva hetta á sýnisseðilin. Kanningarstovurnar tulka úrslitini eftir galdandi standard krøvum ella spesifikatiónum, sum kundin ynskir tulking upp ímóti. Ávísingarmark, óvissa v.m. av úrslitunum í sambandi við kanningarnar kunnu fáast við at venda sær til kanningarstovurnar.

## 15 Brúk av úrslitum

Øll kanningarúrslit eru í trúnaði, og meginreglan er, at bert kundin fær kanningarúrslitini**.** Undantakið er tó, tá ið fráboðanarskylda er sambært lóg. Taltilfar viðvíkjandi kanningarúrslitum til hagfrøðiliga viðgerð o.a. kann einans brúkast í almennum høpi**,** um eigarin av kanningunum hevur givið loyvi til tess.

Kundin hevur ábyrgdina av, hvussu úrslitini verða brúkt. Svarseðilin fyri kanningarnar kann tó bert endurgevast í síni heild, ikki sum partar, uttan at kanningarstovan skrivliga hevur góðkent hetta. Kanningarstovan kann ikki ábyrgdast yvir fyri triðja persóni um, hvussu kanningin er gjørd, og hvussu úrslitini verða brúkt.

## 16 Kanningar á aðrari kanningarstovu

Tá ið kanningarstovan av einari ella aðrari orsøk ikki kann gera tær greiningar, sum kundin ynskir, verða aðrar kanningarstovur brúktar. Tær kanningarstovur, sum verða brúktar, eru vanliga altjóða góðkendar á tí ávísa greiningarøkinum. Kundin skal játta fyri, at tann ávísa kanningarstovan verður brúkt.
Fyri greiningar, sum verða gjørdar í eftirlitinum við heimild í Løgtingslóg nr. 16 frá 23. februar 2001 um djórasjúkur (um fyribyrging og niðurberjing av sjúkum hjá djórum og um marknaeftirlit við djórum og djóraúrdráttum) og Løgtingslóg nr 46 frá 21. juni 1985 um matvørur v.m. kunnu kanningarstovur veljast uttan játtan frá kundanum.

## 17 Kanningarstovurnar sýnast fram

Kundin er altíð vælkomin at vitja kanningarstovurnar og at síggja, hvussu greiningarnar fara fram og fyri at meta um góðskuskipanina. Hetta skal avtalast við deildarleiðaran fyri ta ávísu kanningarstovuna.

## 18 Klaga um kanningar

Klaga um kanningar skal vera skrivlig, og tað er politikkur hjá kanningarstovunum at viðgera klagurnar:

- Út frá bestu fakligu meting
- Sakligt og skjótt
- Opið og reiðiligt mótvegis kundanum.

## 19 Ábyrgdar avmarking

Heilsufrøðiliga starvsstovan kann bert ábyrgdast, um tað kann skjalprógvast, at hon hevur mistikið seg ella verið vanskettin og annars bert við teimum ásetingum og avmarkingum, sum eru nevnd niðanfyri.

Heilsufrøðiliga starvsstovan er, uttan mun til misrøkt ella vansketni, uttan ábyrgd av rakstrarhalli, vinningstapi og øðrum óbeinleiðis missi. Heilsufrøðiliga starvsstovan kann ikki ábyrgdast fyri meiri enn kr. 500.000 fyri hvønn skaða.
Ábyrgdin hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni fellur burtur 5 ár eftir dagfestingina av kanningarúrslitunum.

## 20 Prísur

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur ásett fastar prísir fyri sýniskanningar við heimild í kunngerð nr. 37 frá 2000, sí heimasíðuna www.hfs.fo ella spyr kanningarstovurnar.

Tað verður ikki givið avsláttur uppá teir einstøku prísirnar, men fastur avsláttur kann verða veittur soleiðis:

- Kanningar út yvir 25.000 kr. árliga: 10% í avsláttri
- Kanningar út yvir 50.000 kr. árliga: 25% í avsláttri
- Avslátturin verður avroknaður eina ferð um árið í 1. ársfjórðingi í eftirfylgjandi ári.

Fyri annað umbiðið arbeiði enn sýniskanningar verður víst til príslistan á heimasíðuni. Eisini er møguligt at geva tilboð uppá umbiðið arbeiði.

## 21 Skundprísur

Kostnaður fyri kanningar, ið hava skund, er vanligt gjald + 100%. Viðmerkjast skal á sýnisseðilin, um kanningarnar hava skund.
At kanningar hava skund merkir, at:

- kanningin byrjar so skjótt sum møguligt.
- Úrslit verða send við telefaksi ella pr. telefon.

## 22 Gjaldstreytir

Er eingin serstøk avtala gjørd, fella kravd gjøld til gjaldingar í verandi mánaði + 25 dagar. Verða gjaldstreytirnar ikki hildnar, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan sýta fyri at gera fleiri tænastur fyri viðkomandi, um uppgávan ikki er løgd til Heilsufrøðiligu starvsstovuna sambært lóg.

## 23 Ígildiskoma

Handilstreytir eru galdandi frá og við januar 2003 til og við desember 2003, tá ið tær verða endurskoðaðar.